www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 08 - 2011

# um oljan.fo

www.oljan.fo er eitt samstarv millum FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur og FT-online. Nýggja heimasíðan verður umsitin av FOÍB. Redaktionellu ábyrgdina hevur Jan Müller. oljan.fo - tann føroyski oljuportalurin - kunnar um oljutilgondina í Føroyum - um komandi boringar og teir møguleikar og avbjóðingar henda menning gevur vinnulívinum og samfelagnum sum heild. Oljan.fo setir eisini fokus á frálandavinnuna og teir føroyingar, sum arbeiða í hesi vinnu. Eisini fylgja vit við oljugongdini í umheiminum, her serliga grannalondunum. Tilfar, greinar og tips og viðmerkingar til oljan.fo skulu sendast til jan@foib.fo FOÍB er áhugafelagið hjá oljufeløgunum, sum hava loyvi at leita eftir kolvetnum á føroyska landgrunninum. Felagið ynskir í framtíðini at seta størri fokus á samskifti og kunningarvirksemi. Limirnir í FOÍB eru - Statoil, ENI, DONG, OMV, Valiant Petroleum, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. Formaður í FOÍB er Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum Føroyar, ns@fp.fo. Stjóri í FOÍB er Jan Müller, jan@foib.fo Leinkja til http - //www.foib.fo